

## Kvinna var leiðari í ránsmannaliðið

Tað er ikki hvønn dag at kvinnur verða handtiknar og ákærdar fyri rán, men tað hendi fyri eina 19 ára gamla kvinnu í Kolding.Saman við trimum ungum monnum fór hon inn í eini hús, og greiddi manninum, sum býr har frá, at hann skyldaði henni pening. Fyri at gera greitt, hvussu stórur álvarin var, hevði hon ein stóran greinasaks. Løgreglan var skjót á staðnum, og handtók tey trý.

# Føroyum



*Gudrun Olesen, ið hevur hoyribrek, arbeiðir sum heilsuhjálpari á eldrasambýlinum oman Hoydalar*



*Øll búfólkini hava ein kontakpersón. Gudrun er hjá Johild*

hátt sum í Danmark, og tað kann vera ein grund til, at ongin deyvur í Føroyum er arbeiðsleysur, sigur Gudrun Olesen.

Hon leggur afturat, at hon er sera glað fyri at búgva í Føroyum, og hugsar ikki um at flyta av landinum í bræði.



*Tórhild Dalsgaard, sum er leiðari hjá Gudruni Olesen, metir á ongan hátt Gudruna standa aftanfyri hini starvsfólkini*

# Hon er sum øll hini

**Gudrun Olesen arbeiðir á Eldrasambýlinum oman Hoydalar, og sambært leiðaranum á stovninum er hon sum øll hini starvsfólkini, tó á sín serstaka hátt**

DEYV Í ARBEIÐI

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tórhild Dalsgaard er leiðari á sambýlinum oman Hoydalar, og hon greiðir frá, at Gudrun Olesen er eitt starvsfólk sum øll hini.

- Vit eru sera glað fyri at hava hana hjá okkum. Hóast hon ikki hoyrir og ikki hevur mál, á sama hátt sum vit, so er hon sera dugnalig í sínum arbeiðið. Hon er altíð nærverandi, og búfólkini eru sera glað fyri hana, sigur Tórhild Dalsgaard avgjørd.

Tórhild Dalsgaard hevur verið á stovninum, í umleið eitt ár, og ivast ikki í hvussu stóra jaliga ávirkan Gudrun hevur á stovnin.

- Tá eg kom her var eitt sindur av panikki í. Tað var ongin yvirskipað ætlan, og tí var Gudrun ofta nokk so einsamøll. Men vit gjørdu eina avtalu, um at eg skuldi vera kontaktpersónur hjá henni, og tað hevur riggað heilt væl, greiðir leiðarin frá, um skipanina hon og Gudrun hava gjørt við at senda sms.

Tórhild Dalsgaard greiðir eisini frá, at ein stór hjálp, er at Gudrun er so opin, og at tað ger at samarbeiðið gongur so náttúrliga.

### Er skelkað av grannalondunum

Spurd um arbeiðsloysis tølini í grannalondunum er Tórhild Dalsgaard skelkað.

- Eg skilji hatta í veruleikanum ikki. Eg havi fyrr arbeitt við deyvum starvsfólkum, so Gudrun er ikki tann einasta, og eg skilji í veruleikanum ikki, at tað kann vera so. Gudrun er í hvussu so er sera dugnalig, og hon gevur stovninum eina rúgvu við síni nærveru. Hon hevur eisini lært nógv av okkum tekin, og tað er sjálvandi eisini stuttligt, greiðir Tórhild Dalsgaard frá.

### Tulkatænastan

Sambært Tórhild Dalsgarð hevði tað, hóast góðan vilja og so framvegis, verið sera torført at havt deyv í starvi um ongin tulkatænasta var.

- Tulkatænastan er gull verd. Tey eru við til fundir, útferðir og alt annað, har tað er serliga týdningarmikið, at Gudrun fær alt við. Vit fáa altíð tolk, tá vit hava tørv á tí, og tað ger, at arbeiði fellur so lætt.

### Brek eru góðtikin í Føroyum

- Tað vísir seg sum, at øll kenna onkran, ið ber brek í Føroyum, og tí eru tey kanska eina meira góðtikin partur av samfelagnum, og tað kann vera ein orsøk til, at vit ikki síggja tað sum nakran trupulleika, at fólk eru so tollerant, fortelur Tórhild Dalsgaard, sum ikki er í iva um, at tað er ein fyrimunur at vit loyva teimum, ið bera brek at arbeiða, har tey kunnu.